# Merkisdagar

## Føðingar

15. august fingu Diana P. Strøm, Sumba og Thorvald F. Joensen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3900 gr.

17. august fingu Mildrid Henriksen og Rúni Persson eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

18. august fingu Maria og Gert Norðoy, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3000 gr.

21. august fingu Christina og Tróndur Ravnsfjall, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4095 gr.

21. august fingu Óluva P.B. Johannesen og Jákup Áarberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3990 gr.

21. august fingu Annika H. Eirikstoft og Per Joensen, Kvívík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2580 gr.

22. august fingu Elisabeth og Sigmundur Brestisson, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3115 gr.

22. august fingu Eydna Johannesen og Jón Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4530 gr.

24. august fingu Mona Rakul og Regin við Skipá, Argir, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

24. august fingu Hanna Wang og Jens Peder Groth Hansen, Kaldbak. ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

24. august fingu Birna Thomassen og Sune Berglind, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3000 gr.

25. august fingu Anna Margretha Petersen, Vestmanna og Tórolvur Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3250 gr.

25. august fingu Bjarma Lisberg, Sumba og Kaj André Holm, Hvalba, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3925 gr.

26. august fingu Dan og Marjun S. Kjelnæs, Tórshavn, ein son. Hann vigaði 54 cm langur og vigaði 4400 gr.

26. august fingu Annika Rasmussen, Sørvágur og Leifur av Trøð Trondesen, Skálavík, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 4900 gr.

26. august fingu Jóna Gulaksdóttir Christiansen og Poul Laust Christiansen, Hvalba, ein son. Hann var 52 cm long og vigaði 3180 gr.

26. august fingu Mai-Britt og Ísak Petersen, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3200 gr.

26. august fingu Birita og Bárður Háskor, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3825 gr.

27. august fingu Karolina og Sørin Sv. Danielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4400 gr.

28. august fingu Gunnvá Joensen og Egon Simonsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3875 gr.

### Brúdleyp

Leygardagin 4, september giftast Barbara Poulsen, Hvannasund og Hans Edvard Sigurðsson, Klaksvík. Vígslan er í Hvannasundskirkju kl. 14 og vælkomst verður í Árnafjarðarróðrarfelag frá kl. 19, har vit gleða okkum at halda dagin saman við familju, vinum og kenningum. Øll eru hjartaliga vælkomin

### 80 ára føðingardagur

Leygardagin 4. september fyllir Hergi Hádal 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum v/familju.

### 80 ára føðingardagur

Sunnudagin 5. september fyllir Róald Norðberg í Vági 80 ár. Dagurin verður hildin í Bethel kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

Leygardagin 4. september fyllir Thurid Magnussen í Húsavík 70 ár. Dagurin verður hildin í Sólarris frá kl. 18.30. Øll eru vælkomin.

### 60 ára føðingardagur

Leygardagin 18. september verður Rúna Berghamar 60 ár. Opið hús verður í Pálsstovu kl. 12-17.

# Kjak



**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri*

## Tíverri, skeiv adressa Tummas í Garði

Í viðmerking í Dimmalætting 31. august sigur Tummas í Garði, at tað er Tórshavnar kommunan, ið eigur at loysa trupulleikan, tá fólk eru komin so illa fyri, at tey hoyra heima á røktarheimi, eisini sjúklingar, sum eru liðugt viðgjørdir á sjúkrahúsi.

Men her fer læknastjórin skeivur. Kommunan hevur ikki ábyrgd av eldarøktarøkinum, tað hevur landið.

Kommunan hevur í lóggávu fingið heimild til at byggja ellis- og røktarheim, um landsstýrið góðkennir verkætlanina og játtar rakstur til heimini. Hetta merkir ikki, at kommunurnar hava ábyrgd av, at fólk, ið hava tørv á røkt, fáa hana. Tað ábyrgdina eiga landsmyndugleikarnir einsamallir, soleiðis sum uppgávubýtið er á eldrarøktarøkinum.

At kommunurnar í alt størri mun hava átikið sær alt fleiri uppgávur á eldraøkinum, tí landið ikki røkir sína skyldu, gevur ikki kommununum hesa skyldu, men er bert úrslit av, at kommunurnar kenna ábyrgd fyri sínum borgarum og tí ikki kunnu lata standa til. Her eru kommunurnar ikki øðrvísi fyri enn landssjúkrahúsið, sum eftir øllum at døma eisini hongur uppá eina uppgávu, sum stovnurin í veruleikanum ikki eigur.

Niðurstøðan hjá greinaskrivaranum – at kommunan skuldi havt pláss tøkt til liðugt viðgjørda sjúklingin – er tí heldur ikki røtt. Kommunan hevur ikki skyldu til at hava pláss tøk ella av røkt til eldri borgarar yvirhøvur. Tíverri vil eg siga, tí var hetta ein kommunal skylda, og eitt økið, sum kommunan varðaði av, so eri eg vísur í, at støðan var øðrvísi enn hon er í dag, og tænastan til borgaran munandi betur.

Frá kendu yrkingini um bakaran og smiðin hjá dansk-norska høvundanum Johan Herman Wessel, kenna vit orðatakið "at rette bager for smed" – hugsi, at læknastjórin er á somu kós, tilvitað ella ótilvitað! Men í hesum málið eru kommunurnar við vissu ósekar.



**Herálvur Jacobsen**

## Har fór eftirútbúgvingin

Í gjárkvøldið visti útvarpið at siga, at av tí at so nógv fleiri lesandi enn væntað (538) eru byrjað í ár, er í uppskotinum til eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2010, ið var lagt á tingborð fyrradagin, skotið upp at hækka játtanina til lestrarstuðul við 2,2 mió. kr. Hetta er í sær sjálvum at fegnast um, tó ikki, um tað verður gjørt fyri rokning fólkaskúlans. Tá játtanin skal verða útreiðsluneutral, verður m.a upphæddin til nýstovnaða Vitan lækkað við 600 tús. kr. Ikki sørt av einum vónbroti, at stovnurin, sum skal vera lokomotivið í skúlaverkinum, fær slíka byrjan. Eisini var sagt, at játtanin til Fróðskaparsetur Føroya verður lækkað við 700 tús. kr. Fert tú at blaða í uppskotinum, kemur tú fram á, at tær 700 tús. krónurnar allar verða tiknar av eini konto, ið eitur: **Eftirútbúgving av lærarum**. Har standa í ongamannalandi 2.680.000 kr., sum nú verða lækkaðar niður í 1.980.000 kr. Helst er tað serlæraraútbúgvingin sum ger, at kontan ikki púra verður volað. Hinvegin er tað undrunarvert, at einki kundi bera til á eftirútbúgvingarøkinum, tá pengarnir hóast alt nú kunnu flytast á annað stað. Serliga tá hugsað verður um, at hetta eru tøl, vit hava kent síðani 1. okt. í fjør.

Um talan er um vantandi vikartímar, ið ofta verður havt á lofti, kundi Helena sjálvandi valt at flutt tær 700.000 kr. tann vegin ístaðin. Fyri hesa upphædd kundu leysliga mett 25 - 30 lærarar fylgt linjufaksútbúgving eftir nýggju bachelorskipanini, sum Fróðskaparsetrið fór undir í summar. Tað, ið lat seg gera í fjør, er gjørt vónleyst í ár.

Ein kann tí illa koma til aðra niðurstøðu enn, at tað meiri er vantandi stýring enn játtan, ið er atvold til hesa støðu, og um vit ikki broyta kós, enda vit, har vit í løtuni stevna fram ímóti.